# Grand Prix finala uttan Lindu og Vígdis



*Vígdis og Linda vóru á pallinum í donsku finaluni, men sleppa bert at uppliva evropeisku finaluna í sjónvarpinum.*

**Koreografiin hjá danska Grand Prix vinnaranum DQ er somikið nógv broytt síðan donsku finaluna, at Vígdis Hentze Olsen og Linda Andrews eru vrakaðar áðrenn finaluna í Helsinki**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Hóast føroyska songkvinnan Linda Andrews og føroyska dansarinnan Vígdis Hentze Olsen vóru við til at tryggja danska Eurovision vinnaranum DQ atgongd til stóru evropeisku finaluna í Helsinki, so verður hvørgin teirra at síggja á pallinum leygarkvøldið, tá væntandi væl yvir 100 milliónir hyggjarar seta seg framman fyri sjónvarpsskíggjan.

Upprunaliga skuldu bæði Linda og Vígdis við til Finlands, og Linda hevur somuleiðis sungið kór á upptøkunum av vinnaralagnum Drama Queen, ið hevur verið nógv at hoyrt í Danmark. Men tá avtornaði, fingu Linda og Vígdis at vita, at tær ikki sluppu við til Finlands. Tað er koreografurin hjá Danmarks Radio, ið hevur lagt framførsluna hjá DQ til rættis, sum hevur vrakað føroysku luttakarnar. Grundgevingin var, at Linda ikki dugir nóg væl at dansa og at Vígdis ikki dugur nóg væl at syngja. Nýggja koreografiin kravdi, at talan var um dansandi kórsangarar, og so var ikki pláss til ikki dansandi kórsangarinnuna Lindu og ikki syngjandi dansarinnuna Vígdis. Sostatt mugu føroyingar brynja seg við toli, tað verður sostatt minst eitt ár inntil vit á fyrsta sinni sleppa at uppliva ein føroying í Eurovision finaluni ella í grand prixnum, sum tað eitur á góðum gomlum føroyskum.




Vitanardeildin tekur sær av umsiting og menning av KT-undirstøðukervi og fakskipanum, KT-trygd, KT-nýtslu og kunning.

## Almannastovan søkir KT-starvsfólk

Í næstum verður farið undir eina stóra KT-verkætlan, samstundis sum nógvar avbjóðingar eru innan KT-økið á Almannastovuni.

Hevur tú hug at royna teg í einum spennandi arbeiðsumhvørvi við áhaldandi menning, so eru avbjóðandi og mennandi størv sum KT- starvsfólk á Vitanardeildini leys at søkja.

Umsóknarfreistin er 23. mai 2007 kl. 9.00.

Meira fæst at vita um størvini á almannastovan.fo ella portal.fo ella við at venda sær til Frankie Jensen, leiðara á Vitanardeildini, á telefon 35 35 10 ella 21 54 56.

almannastovan
www.almannastovan.fo

KREA.FO · TEL 47 80 80



Útbúgving aug. 2007 Les meira á www.tst.fo

## Millumleiðaraútbúgving

### Byggitøkningur

- Projektering
- Byggiframleiðsla
- Projektstýring
- Tekning (AutoCAD)
- Virkisrakstur o.m.a.

Umsóknarfreistin er 10. mai

.... Vit kunnu í ávísan mun laga útbúgvingina og innihaldið í verkætlanum eftir áhuga.
Luitjen Apol, næmingur

..Eg havi ikki avgjørt, um eg fari at lesa víðari, men nú havi eg so eina utbúgving afturat. At byrja við kundi eg hugsað mær at starvast á onkrari spennandi teknistovu.

Marianna Høgnesen, næmingur

Útbúgvingin til byggitøkning er tann sama sum fyrsti partur av byggifrøðingaútbúgvingini.
Útbúgvingin miðar m.a. ímóti størvum í byggivinnuni og virkjum, ið framleiða byggitilfar, ella hjá ráðgevandi verkfrøðingum.
Útbúgvingin tekur 2 ár.

Útbúgvingin er til tín, sum kundi hugsað tær eitt millumleiðarastarv í byggivinnuni, ella kanska tú ivast í at lesa víðari.

Les meira á www.tst.fo ella ring 308050 og fá meir at vita



Útbúgving aug. 2007 Les meira á www.tst.fo

## Millumleiðaraútbúgving

### Framleiðslutøkningur

- Leiðsla & samstarv
- Projektleiðsla
- Maskinkonstruktiónir
- 3D Tekning (Inventor)
- Automatiseringar
- Styrkilæra o. m. a.

Umsóknarfreistin er 10. mai

Útbúgvingin er til tín, sum kundi hugsað tær eitt millumleiðarastarv í vinnuni, ella kanska tú ivast í at lesa víðari.

Útbúgvingin miðar ímóti at útbúgva fólk til m.a. millumleiðarar innan ymisk arbeiðsøkir í vinnuni, eitt nú innan ídnaðar- og framleiðsluvirkir, á teknistovum, í alivinnuni, maskin- og bilverkstøðum v.m.
Útbúgvingin tekur 2 ár.

...... mín tekniski kunnleiki vaks, eins og mín vitan um at stovna og reka eina fyritøku. Harumframt ynskti eg at økja um mínar møguleikar viðvíkjandi víðari lestri.

Niels Petersen, næmingur

........seinni í lestrinum er møguleiki at arbeiða meira málrættað við evnum, ið hava júst okkara áhuga...

Gunnar Joensen, næmingur

Les meira á www.tst.fo ella ring 308050 og fá meir at vita